# Fundarfrágreiðing til HSF-limafund hósdagin 1. feb 2024

Luttakandi: Gunn Ellefsen, Jógvan Emil Nielsen, Kristian Østergaard og Durita Thomsen fyri Starvsnevndina. Høgni Vilhelmsen, Eyðun Mortensen og Ása á Neystabø fyri Kappingarnevndina. Ann Mari Wang fyri Menningar- og Úrvalsnevndina. Ári Rouch, Mark Lausen-Marcher, Hallur Danielsen, Hans Jón Thomsen og Andrass Thomsen fyri umsitingina. Rúni Mohr fyri EB. Eyð Hansen og Bjørg Paturson fyri VÍF. Teitur Magnusson fyri Neistan, Egi Gothard Danielsen og Sára Mrdalo fyri StÍF. Anja Weyhe fyri KÍF. Annika Arge fyri Stjørnuna. Jensia Højgaard Kjærbæk, Eyðun Mortensen og Maibritt Johannesen fyri Kyndil. Eyðun Joensen, Alfred Jacobsen, Emi Sólvitsdóttir og Anna Dam fyri H71. Johild G. Nolsøe fyri ÍA. Sólja Jóanisdóttir, Høgni Joensen og Jógvan Olsen fyri SÍF/Søljan. Ikki umboðaði VB og Team Klaksvík.

Hans Jón Thomsen, fráfarandi stjóri, beyð vælkomin og gjøgnum gekk skránna. Eisini heilsaði nýggi stjórin, Andrass Thomsen, uppá.

**1.0 Virksemi í HSF seinna hálvár 2023**
Hans Jón Thomsen gjøgnumgekk virksemi fyri seinnu helvt av 2023.

**1.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**2.0 Framløga um áskoðaraávirkan á kvinnuligar hondbóltsleikarar**
Drós Ragnarsdóttir legði fram og greiddi frá høvuðsritgerð sínari í ítróttasálarfrøði, har m.a. ein av niðurstøðunum var, at menn og kvinnur kunnu reagera ymiskt uppá áskoðaraávirkan.

**2.1 Niðurstøða**
Viðkomandi kjak og spurningar vóru eftirfylgjandi.

**3.0 Menning av kvinnulandsliðum**
Mark Lausen-Marcher og Hallur Danielsen løgdu fram og settu spurningin, hví at tað vóru so nógv avboð til landsliðini á kvinnusíðuni, serliga tey eldru. Meðan so at siga eingi avboð vanliga eru til yngra kvinnuungdómslandsliðið, sum fer til European Open og U17 Championship, so vóru heili 8 avboð til U19-landsliðið, sum var avstað í heyst. Eisini á A-landsliðnum hjá kvinnum eru javnan avboð. Á manssíðuni eru sjáldan avboð til landsliðiðini. Lagt var upp til kjak, um hví so kundi vera, um t.d. ymsar sosialar samanhangir

**3.1 Niðurstøða**
Fleiri hugsanir vóru frammi, um hví støðan var sum hon var. Ein varðlig niðurstøða var, at tilgongdin til mans- og kvinnulandsliðini ikki neyðturviliga skal vera hin sama.

**4.0 Uppskot at broyta § 6 í "Ymsar serreglur"**
Mark Lausen-Marcher, ítróttastjóri, kunnaði um uppskot, sum var ávegis. Hetta at loyva leikbrá í U16 og U14 deildunum, eitt í hvørjum hálvleiki. Hartil at lið í U16 og U14 kunnu skifta málverjan út við útileikarar, tá liðið er í undirtali.

**4.1 Niðurstøða**
Feløgini vóru jalig og skal umsitingin senda eitt uppskot til hoyringar, sum síðani endalig støða kann takast

til á limafundinum í mai.

**5.0 Vantandi uppmøting í Vági**
Ári Rouch, kappingarsamskipari, legði fram. Leygardagin tann 20. januar vóru 4 lið, sum ikki møttu upp til dystir í Vági. Ári greiddi frá, at í hesum ávísa førðinum, vóru tvey G12-lið sum boðaðu frá sjúku, eitt D10 lið, har annað ítrív varð tikið fram um, meðan eingi boð komu frá 2. deildarliðið. Ári vísti á, at bótin fyri ikki at møta upp í Vági er 3.000 kr. Víst var á yvirlit yvir seinastu 10 árini, har tað var staðfest, at tað gekk heldur betri við uppmøting í Vági nú. Eisini var víst á, at uppmøting ikki endiliga var betri aðrastaðni í mun til í Vági. VB hevði í telduposti undan fundinum víst á, at tey saman við feløgunum norðanfyri fegin vildu virka loysnum um okkurt felag hevði ítøkiligt uppskot.

**5.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur, og var semja um, at farðast skuldi fram í góðum samskifti við einum jaligum hugburði til at fara til Suðuroyar.

**6.0 Tilmeldingarfreistir 2024/25**
Ári Rouch, kappingarsamskipari, legði fram. Fyri at betri um planlegging av kappingarárinum, er tað ynski hjá HSF, at kappingarnar hjá U14 og uppeftir verða lagdar fyri summarfrítíðina. Víst var á yvirlit, sum verður lagt á heimasíðuna saman við álmanakkanum og samstundis týdningin at feløgini halda freistirnar.

**6.1 Niðurstøða**
Feløgini vóru jalig og góvu kunningini gætur.

**7.0 Skeiðskalendarin**
Mark Lausen-Marcher legði skeiðskalendaran fram fyri 2024, sum verður lagdur á heimasíðuna.

**7.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**8.0 Steypafinalurnar**
Hans Jón Thomsen kunnaði um steypafinalurnar, sum liggja vikuskiftið 16. – 18. februar.

**8.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**9.0 Steypafinalurnar**
Hans Jón Thomsen kunnaði um gallaveitsluna, sum eftir ætlan verður leygardagin 18. mai. VB hevur bjóðað seg fram at hýsa veitsluni, men eru í løtuni avbjóðingar við hølum, tá VB-húsið er útleigað. Arbeitt verður tó við at finna hóskandi høli.

**9.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**10.0 Innkomið mál**
Teitur Magnusson, formaður í Neistanum, hevði sent mál inn at viðgerða. Víst var á óhepnu støðuna, har

ein ungdómslandsliðsvenjari, sum eisini var venjari í bestu deildini í Føroyum, hevði vent sær til leikara í einum felagi um eitt møguligt skifti til felagið har landsliðsvenjari eisini var venjari.. Teitur vísti á tað óhepna í hesum, hetta í mun til óhepnu støðuna hetta kann seta ein leikara í, í mun til eitt møguligt lansliðspláss. Eisini er hetta óheppi í mun til samstarvið millum feløgini og HSF.

Gunn Ellefsen, forkvinna, viðmerkti, at HSF gjarna vil virka fyri at fáa fleiri føroyskar venjarar og landsliðsvenjarar, sum eisini eru virknir í føroyskum feløgum. Hesir skulu tó vanda sær um sín leiklut og ábyrgdina teir hava. Forkvinnan var samd í, at ítøkiliga dømið var óheppið og skal ikki koma fyri. Landsliðsvenjarar skulu kenna sín leiklut og duga at skyna á millum leiklutirnar. Venjarar skulu t.d. ikki vera í landsliðsklæðum til eina venjing í felagnum, tí hetta útstrálar ikki tað rætta.

**10.1 Niðurstøða**
Feløgini og leiðslan í HSF vóru samd um, at venjarar framyvir minnast á teirra leiklut sum landsliðsvenjarar.

**Fundarskrivari:**
Ári Rouch